## Real Madrid og Audi



Sum liður í 3 ára sponsoravtalu millum spanska fótbóltsfelagið Real Madrid og Audi bilverksmiðjuna fingu spælararnir her fyri Audi bilar handaðar á Santiago Stadium. Raul og Ronaldo valdu sær Audi RS6 Quattro, meðan Figo valdi sær ein Audi A8 4,2 Quattro

*Kelda: Semler.dk*

## Vivaro pickup



Á bilaframsýningini í Herning í oktober vóru nógv nýggj modell frá Opel, m.a. hesin Opel Vivaro pickup, ið lastar eitt tons.

*Kelda. Motor Magasinet*

## Alfa Romeo 166



Flaggskipið hjá Alfa Romeo, Alfa Romeo 166, ið er ein stórur luksusbilur, er nú komin í eini nýggjari og nakað broyttari útgávu. Størsti motorurin er ein 3,2 litur V6 við 240 hk

*Kelda: Motor Magasinet*



*Framkomnar elektroniskar trygdar- og hjálparskipanir í nýggju bilunum eru ein góð hjálp hjá bilførarunum*

*Mynd: FDM / Motor*

# Framkomnar trygdarskipanir spara mannalív

**Meðan orðaskiftið um píkadekk ella ikki píkadekk hevur staðið við í yvir 30 ár, eru bilarnir so nógv broyttir og hava nú fleiri ymiskar trygdar- og hjálparskipanir, sum gera at støðan faktiskt er ein heilt onnur í dag**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tey sum fylgja við og lesa um nýggjar bilar, sum koma á marknaðin gerast skjótt varug við, at tað alla tíðina koma nýggjar og framkomnar trygdar- og hjálparskipanir í bilarnar. Allar hesar skipanir eru við til at gera bilarnar tryggari í ferðsluni undir øllum koyriumstøðum.

Eisini dekkini blíva betri og tryggari, og gummiblandingin í dekkunum verður alla tíðina betra til tær umstøður, dekkini skulu brúkast til. Summardekk til fast undirlag og vetrardekk til kava og ís. Um vit til dømis fara umleið 30 ár aftur í tíðina, tá fyrstu bilarnir koyrdu við píkadekkum, vóru hetta grov-mynstraði kavadekk við píkum. Fyri umleið 20 árum síðan komu lamelldekkini, sum vóru ein sonn kollvelting, hetta at hvør puntur í dekkmynstrinum var skorin sundur í smár lamellir, saman við eini heilt serligari gummiblanding, gjørdi, at hesi dekk kláraðu seg avbera væl í kava og frosti.

### ABS, antispinn, ESP og EBD

Síðan eru tað tær elektroniskу trygdar- og hjálparskipanirnar, sum antin eru standardútgerð ella fáast sum eykaútgerð, t.d. bremsur við anti blokerings system (ABS), antspinn, elektroniskt stabilitetsprogram (ESP) og elektronisk bremsukraft deiling (EBD).

Við ABS bremsuskipan blokera hjólini ikki, hóast bilførarin bremsar hart upp. Hetta ger, at bilførarin kann koyra uttan um eina forðing, sum hann kanska annars hevði rent á, um hjólini høvdu blokera.

Antispinn hjálpir til, tá tey drívandi hjólini fara at spola, og vandi er fyri, at bilurin ikki kemur fram. Tá regulerar skipanin motorkraftina ella bremsar tí hjólinum sum spolar. Skipanin brúkar vanilga somu elektronisku sensorarnar sum ABS skipanin.

Elektroniska stabilitets programmið ESP er ein teldustýrd skipan, sum hindrar bilinum í at glíða út í svingum. Skipanin registrerar hvussu skjótt forhjólini mala runt. Um tað er ein munur á ferðini, grípur skipanin inn og útjavnar ferðina.

Síðan er tað elektronisk bremsukraft deiling, EBD, sum hjálpir til um bilførarin ikki traðkar nóg hart á bremsupedalin. Skipanin registrerar, at bilførarin hevur brúk fyri, at bilurin skal steðga skjótt og hjálpir síðan til við meira bremsukraft.

Við øllum hesum framkomnu elektronisku trygdar- og hjálparskipanum og nýggjastu vetrarlamelldekkunum, kann man siga, at bilarnir eru blivnir nógv tryggari. Kanningar vísa, at nógv mannalív verða spard í ferðsluni orsaka av hesum elektronisku skipanum.

W W W . S O S I A L U R I N . F O






# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**




**FORD FOCUS STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg 16.maj 2002, Km 41.000. Sum nýggjur: Centrallás- El.Rútar-Hita í forrúti - Hita í Forsetrum - Radio v.bandsp. v.m. Bert 1. ár og 5. Mán. Seldur vegna keyp av 7.pers. bili. Kr. 175.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 10.Apríl 96, Km 70.000. Sera vælhildin: C.D.Anlegg - Centrallás - El. Rútar - El. Spegl v.m. Kr. 85.000.



**PEUGEOT EXPERT 2.0 HDI 8.PERSÓNAR**
Árg Jan-03, Km 12.900. Selist vegna keyp av 4.Hjólstrekkjara. Sum nýggjur: Alufelgur - Eyka vetrarsett -Tónaðar rútar - El-rútar - El-spegl- Fj.stýrt centrallás- C.D.Anlegg - Sleipikrók v.m. nýggjur 295.000,-. Kr. 258.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Sera vælhildin: Aircondition - Alufelgur- Fjarstýrt centrallás - El-Rútar - El Spegl v.hita. C.D.Anlegg- Sleipikrók v.m. Kr. 158.000.



**HONDA CIVIC**
Árg Sept .2001, Km 20.700. Aircondition - El.rútar - El.spegl v.hita -Radio - Fjarstýrt centrallás v.m. Sum nýggjur. Tilboð kr. 138.000. Kr. 145.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg 17 Jan. 1997, Km 49.000. Fjarstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl-Radio v.bandspælara eyka tectylviðgjørdur. Selist vegna flyting til Danmark. Kr. 64.000.

P/f D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650






**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Apr. 1998, Km 115.000. Ring og spyr. Kr. 75.000.



**FORD FOCUS 1.8TD 5H**
Árg Aug. 1999, Km 77.000. Kr 120.000 Prísur fyrr kr 135.000.



**CITROEN JUMPER 2.5TD LH**
Árg Aug. 1996, Km 125.000. Prísur fyrr kr 120.000 – **Nú** Kr. 105.000.
**SUPER TILBOÐ v/mvg bilur uttan í býti 90.000 kr.**



**CITROEN XSARA 2.0HDI 5H SX**
Árg Jun-00, Km 76.000. Ring og spyr. Kr. 135.000.



**HONDA CIVIC 1.5I V-TEC 4H**
Árg Jun-96, Km 119.000. Ring og spyr. Kr. 80.000.



**TOYOTA COROLLA VERSO 2.0D4-D**
Árg Feb. 2002, Km 39.000. Ring og spyr. Kr. 155.000. v/mvg vøruvognur



**DEMOBILUR - CITROEN XSARA 1.6I STC. PRESTIGE**
Árg Sept. 2002, Km 7.000. Ring og spyr. Nýprísur 184.000,- – **Nú** Kr. kr 150.000.



**MAZDA 626 2.0TDI 4H**
Árg Mei-99, Km 79.000. Ring og spyr. Kr. 148.000.



**CITROEN XANTIA 1.9TD STC.**
Árg Des. 1998, Km 101.000. Kr 125.000. Sýnaður í sept. 2003.



**VW POLO 1.6 3H**
Árg Jul-95, Km 26.000. Kr. 69.000. Sera væl hildin

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo






**FORD**
Árg Jul-89, Km128.000. Kr. 12.000.



**DAEWOO**
Árg Oct-00, Km. 73.000. Kr. 114.700.



**DAEWOO**
Árg Aug-99, Km. 43.000. Kr. 65.000



**DAEWOO**
Árg Dec-00, Km 56.000. Kr. 108.700.



**KIA**
Árg Nov-97, Km 102.000. Kr. 59.700.



**FORD**
Árg Oct-91, Km 212.000. Kr. 15.700.

P/f Esmar Simonsen
TEL. 44 44 05 · FAX 44 46 29